# Vikuskifti

Nr. 89 • leygardagur • 10. mai 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

## Grønt fyri allar pengarnar



Charlotte Højberg í Húsavík er farin undir at dyrka vistfrøðiligt grønmeti í stórum nøgdum.
– Grønmeti í Føroyum er alt ov dýrt, og tað ætli eg mær at kappast við, sigur Charlotte, sum ikki er í iva í, at grønmeti fer at vaksa uttan trupulleikar í Føroyum

Lesið síðu 4 & 5



*Garðurin hevur mín stóra áhuga, sigur Likkulikkuleia omman, sum hevur verið við til at fáa skjaldrini inn aftur í føroyska mentan ígjøgnum barnasendingar hjá Vár B. Jacobsen og Páll Danielsen*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Omman hjá øllum

Vilhelmina Larsen í Dali er Likkulikkuleia-omman. Hvørt fríggjakvøld er hon í luftini saman við Beiggja og Systi, og saman gera tey Leski Likkuleiu.
– Eg haldi, at tað er stuttligt at vera omman hjá øllum í Føroyum. Mær dámar væl at gera sjónvarp, og eg haldi, at tað er ógvuliga stuttligt at spæla, sigur Vilhelmina Larsen

SAMRØÐA
*Ingrid Bjarnastein*

**Dalur, Sandoy:** Fyrsti íbúgvin, ið bjóðar okkum vælkomin til Dals, er ein illur gásasteggi, sum blakar seg upp ímóti síðuni av bilinum.

Á trappuni í einum brúnum húsum situr Vilhelmina saman við manninum Hilmar, og veittrar til okkara.

– Her er gás í hvørjum húsi, sigur hon. – Og handan steggjan átti grannin.

Vit fara innar í køkin. Døgurðin er júst ruddaður av, og vit sessast kring tað runda trækøksborðið. Hetta fellur ikki hvørjum barni í Føroyum í lut. At sita í køkinum og práta við Likkulikkuleia-ommuna, sum er at síggja á sjónvarpsskíggjanum hvørt fríggjakvøld saman við Beiggja og Systi.

### Av tilvild

– Í veruleikanum var tað av tilvild, at eg kom at vera við í Likkulikkuleiu. Nøkur norsk fólk vóru í Føroyum, sum ferðaðust runt við eini barnaskrá við skjaldrum. Tey komu frá Riksteatret haldi eg. Jan Kløvstad var stjóri Norðurlandahúsinum tá, og hann spurdi meg so um eg vildi verða við fyri at samanbera, og fyri at vita, um vit høvdu nakað sum líktist í Føroyum, greiðir Vilhelmina frá.

– Eg fór so við, og vit høvdu eina framførslu í Kommunuskúlanum í Havn fyri næmingum og lærarum. Steinbjørn B. Jacobsen, lærari har, kom síðani til mín aftaná, og segði, hvussu væl honum hevði dámt framførsluna.

Seinni bar so á, at Vár B. Jacobsen (dóttir Steinbjørn B. Jacobsen, red.) og Páll Danielsen skuldu gera barnasendingar, og tey vildu hava okkurt gamalt føroyskt við. Og tá var tað, at Steinbjørn hevði skotið upp, at Vilhelmina skuldi koma við at syngja skjaldur.

*Framhald á næstu síðu*